

*Sjónin oman yvir Jerusalem er bergtakandi. Tempulplássið. Al-Aqsa moskan. Stóra og gullskrýdda Fjallamoskan. Forni býmúrurin um gamla býarpartin. Kedronsdalur. Getsemane urtagarður o.s.fr. Hóast tað í dag er gjørligt at ferðast kring allan býin, ávirkar gamla stríðið um rættin til Jerusalem framvegis lívið í heilaga býnum*

# Ferð mín

Frá fornum tíðum hevur Jerusalem verið ein blóðugur vígvøllur millum ymsar religiónir og fólkasløg, sum øll hava kravt sín rætt til valdið í heilaga býnum. Men hóast tað í dag er gjørligt at ferðast kring allan býin, er Jerusalem framvegis merktur av gamla stríðnum um rættin til valdið

FERÐAFRÁSØGN
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Sólin bakar niður á hvítu føroysku herðarnar hendan leygarmorgunin seinast í juni. Føroyska ferðalagið hevur leitað sær niðan á navngitna Oljufjallið og skoðar oman yvir heilaga býin. Samskiparin av túrinum og ísraelsvinurin Svenning av Lofti greiðir frá, og føroysku pílagrímarnir spíla oyruni og krympa eyguni í sterka sólarljósinum. Sjónin oman yvir Jerusalem er bergtakandi. Tempulplássið. Grátimúrurin. Al-Aqsa moskan. Gullskrýdda Fjallamoskan. Forni býmúrurin um gamla býarpartin. Kedronsdalur. Getsemane urtagarður o.s.fr.

### Ein býur í tvíningum

Men Jerusalem er alt annað enn tann friðsæli staður, sum navnið, løtan og sjónin á Oljufjallinum annars bera boð um. Hetta er landið og býurin, sum Móses, Ábraham og Dávid fingu frá Gudi. Hetta er býurin, sum hevur verið undir rómverskum, bábeloniskum og arabiskum harradømi í øldir. Og hetta er býurin, sum hevur verið ein blóðugur vígvøllur millum muslimar og kristnar krossfararar í 12. og 13. øld, inntil muslimarnir róku teir seinastu evropeisku krossfarararnar úr Palestina í 1291. Tá staturin Ísrael varð stovnaður í 1948, varð býurin býttur sundur við píkatrái, landminum og betongmúri. Jordan fekk Eysturjerusalem og Ísrael gjørdi Vesturjerusalem til høvuðsstað. Eftir seksdagakríggið í 1967 tók Ísrael valdið yvir øllum býnum, og í 1980 viðtók ísraelska parlamentið Knesset, at alt Jerusalem skuldi vera sameindi høvuðsstaður Ísraels. Henda samtykt varð ikki góðkend av ST. Í 1988 viðurkendi táverandi palestinski forsetin Yassir Arafat statin Ísrael, og í 1993 viðurkendi Ísrael palestinsku sjálvstýrisrørsluna PLO. Viðurkenningar, sum nýggja Hamas-stjórnin hevur strikað, og sum hevur elvt til nýggjan ófrið. Í dag hava palestinar avmarkað sjálvstýri í Eysturjerusalem, og harvið er býurin í tvíningum millum tvær religiónir og tvey fólk, sum bæði krevja sín rætt til at ráða í heilaga býnum.

### Hernaðarligt tilverugrundarlag

Lat tað verða sagt beinanvegin, at føroyska ferðalagið upplivdi bert frið og tryggleika á túrinum. Men eftir fáar dagar í Jerusalem var samstundis eyðsæð, at ósemjan setir síni djúpu spor á lívið í býnum. Hóast fólk liva lið um lið, og hóast vit kundu ferðast frítt í øllum Jerusalem uttan trupulleikar, vitna mongu og vápnaðu trygdardeildirnar um ein bý í tvíningum. Blaðung standa tey í myrkagrønum herbúna, skottryggjaðum vesti og skínandi maskinbyrsum við ymsu býarmørkini millum Eysturjerusalem, sum er undir palestinskum valdi, og Vesturjerusalem, har ísraelar ráða. Eyðkenda Dávid-stjørnan er at síggja á bæði vápnum og herbúnum hjá ísraelsku herfólkunum. Í gamla býarpartinum jødisku megin markið skifti eg orð við ein 18 ára gamlan hermann.

– Í Ísrael er herurin alfa og omega. Vit hava hernaðarskyldu í trý ár í aldrinum frá 18 til 21, meðan kvinnurnar hava tvey ára hernaðarskyldu, sigur ungi og fryntligi hermaðurin. Spurdur, um hann ikki vildi sloppið undan heili trimum árum í herinum, yppir hann øksl.

– Hetta er ein skylda, sum ikki slepst undan, tá tú býrt í Ísrael, sigur hann og vísir á blóðugu søguna hjá unga móðurlandi sínum.

Allastaðni eru tey samd um, at ein sterkur herur er sjálvt tilverugrundarlagið hjá statinum Ísrael, tí tjóðin er umgyrd og hevur verið hótt av grannunum Libanon, Sýria, Jordan, Egyptalandi og palestinska sjálvstýrisøkinum.

– Ísrael hevur mark móti fimm grannalondum, sum øll ynskja statin Ísrael, har piparið grør. Seksdagakríggið í 1967 og Yom-Kippur kríggið í 1973 vitna um, at eksistensurin hjá Ísrael er tengdur at hernaðarligari yvirvág, sigur danski ferðaleiðari okkara, sum hevur búð í Ísrael í 40 ár og konverteraði á ungum árum til jødadómin.

Í havnarbýnum Kesarea við Miðjarhavið hitti eg seinni tvær gentur, sum skulu byrja í herinum eftir summarsteðgin. Eftir at hava sagt teimum, at vit ikki hava hernaðarskyldu í tí landi, eg komi úr, standa tær sum kánus.

– Hvat gera tit so, um okkurt grannaland loypur á, spyrja tær, og hóast eg royni at sannføra tær um, at eitt álop er ógvuliga ósannlíkt, rista tær undrandi við høvdinum.

– Føroyingar mugu vera bláoygdasta fólkaslag í heiminum, eru tær samdar um.

### Gjøgnum trygdarmúrin til Betlehem

Triðja morgunin í Jerusalem gongur leiðin við føroyska